Stytta tí›ina tey longu vetrarkvøldini

Fleiri flokkar á Kvøldskúlanum eru longu fulltekna›ir, hóast undirvísingin ikki er byrja› enn. Í ár n‡tta 3000 næmingar høvi› at fáa undirvísing eftir loknan arbei›sdag

Kvøldskúlin hevur á hvørjum ári frams‡ning av teimum tingum, næmingarnir hava gjørt gjøgnum ári›. Hetta er frams‡ningin frá í fjør

Stefan í Skorini

Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli fer undir sín 29. vetur vi› undirvísing um kvøldarnar. Játtanin er tann sama sum undanfarin ár, og tali› av næmingum hevur eisini hildi› seg á sama stø›i sum á›ur.

Nógv hava n‡tt høvi› at fáa undirvísing um kvøldarnar á Kvøldskúlanum, tí longu nú eru fleiri flokkar fulltekna›ir. L‡st var› í blø›unum fyri tveimum vikum sí›ani, og fólk vóru beinanvegin skjót at taka av.

- Vit l‡stu eitt sindur fyrr í ár enn í fjør, og fleiri enn vænta› hava tekna› seg. Ta› var skjótt, at nógvir flokkar vór›u fullir, sigur Napoleon Klein Nólsoy, stjóri í Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla.

Í hesum teldutí›um eru ta› flest, sum ynskja at fáa meira kunnleika um teldur. Skei›ini eru fyri byrjarar og tey, sum hava roynt at n‡tt teldu fyrr. Hetta skei›i› hevur flest næmingar, og seks teldurflokkar eru, sum fara at fáa undirvísing í vetur. Teldulæra hevur eisini flest flokkar.

Longu nú eru eini fimtan lærugreinar, sum eru fulltekna›ar. Hetta er alt frá ættargransking til urtagar›srøkt. Ætlanin er at l‡sa í blø›unum aftur, tá ta› er greitt, hvørjir flokkar ikki eru fulltekna›ir.

Kvøldskúlin hevur skei› á níggjunda og tíggjundafloks stø›i, men har hava ikki nógv tekna› seg enn. Flokkarnir fyri breka› eru væl manna›ir, og nógv hava melda› seg til.

Nakrir flokkar hava undirvísing um dagin. Maritim fyrireiking, sum er ætla› næmingum, i› hava ætlanir um at fara á sjómansskúlan ella maskinmeistaraskúlan, er um dagin, og ta› eru vanligar lærugreinar undirvíst ver›ur í.

150 lærugreinar tilsamans

Kvøldskúlin hevur eini 150 lærugreinar, sum næmingarnir kunnu velja ímillum. 160 lærarar fara at undirvísa eini 300 flokkum í vetur. Mi›a› ver›ur eftir at hava átta næmingar í hvørjum flokki í mi›al, tá ári› er at enda komi›.

Napoleon Klein Nólsoy sigur, at 3000 næmingar fara at ganga í Kvøldskúlanum í vetur, og ta› er naka› ta› sama sum í fjør. Ikki er møguligt at taka fleiri næmingar, tí fíggjarligar avmarkingar eru eisini.

- Vit hava ta somu játtanina sum í fjør, og tí hava vit ikki møguleika at taka fleiri næmingar inn, sigur Napoleon Klein Nólsoy.

Fleiri standa á bí›ilista, tí ta› er fulltekna› í fleiri flokkum, men tey mugu brynja seg vi› toli, tí ikki er møguligt at taka fleiri inn. Bara um onkur gevst ber til at sleppa inn. Bí›ilistin telur í løtuni 500 fólk, men stjórin væntar, at nógv fleiri nøvn fara at standa á honum, tá undirvísingin byrjar.

Fyri kreppuna hev›i skúlin eini 4500 næmingar, men játtanin var› skorin nógv ni›ur. Tali› av næmingum hevur veri› á sama stø›i í fleiri ár. Ta› hevur ligi› um teir tr‡ túsund.

Tali› av lærugreinum hevur eisini veri› stø›ugt seinastu árini.

35 ymisk høli

Kvøldskúlin hevur ongantí› havt ein bygning, har allir flokkarnir eru savna›ir. Hinvegin húsast skúlin nú í 35 ymiskum bygningum runt um í b‡num. Teir almennu skúlarnir ver›a nógv n‡ttir.

Napoleon Klein Nólsoy sigur, at ta› er ikki tær bestu umstø›urnar, tá skúlin er spjaddur um b‡in, men ta› gongur hóast alt.

Kvøldskúlin hevur húsast á henda hátt í fleiri ár, og tí eru tey von vi› ta› nú.

Stjórin heldur, at tey mi›aldrandi eru best umbo›a› á skúlanum, men ta› eru eisini nógv eldri fólk, sum ganga til undirvísing. Hann heldur tó, at ta› eru fleiri ung, sum eisini eru farin at n‡ta henda møguleikan.

Tórshavnar Ungdómsskúli var› stovna›ur í 1972. Tvey ár seinni í 1974 var› hann lagdur saman vi› Kvøldskúlanum. Sí›an tá er hann nevndur Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli.

Kostna›urin fyri at ganga á skúlanum er 300 krónur fyri hvørja lærugrein og 4 krónur fyri hvønn tíma. Á fíggjarlógini fær Kvøldskúlin 2 milliónir krónur, me›an fíggjarætlanin hjá skúlanum er 3,4 milliónir krónur.

Vesturvón altjó›a vi›urkenning

–Sum fyrsta skip í flotanum hevur Vesturvón fingi› HACCP certificat

Sørvágur: Vesturvón liggur á Sørvági og mánadagin ver›ur fari› n‡ggjan túr. Men umstø›urnar eru broyttar hjá Vesturvón og vøran, sum ver›ur seld í framtí›ini kemur at hava ein heilt annan klang millum keyparar. Hetta kemst meira av at Vesturvón hevur fingi› eitt altjó›a certificat, sum vísir, at skipi› l‡kur øll altjó›a krøv til matvøruframlei›slu.

Talan er um eitt ví›ka› innaneftirlit og einki anna› skip í føroyska flotanum hevur enn fingi› hetta certificat. Á landi er bara Vestsalmon sum hevur HACCP certificat. Hugtaki› HACCP, merkir: Hazard Analysis Critical Control Point = Risikoanalyse Kritisk Styringspunkt.

Henda skipanin skal veita trygd fyri, øll framlei›sla er á slíkum heilsufrø›iligum stø›i, at hon ikki, á nakran hátt, er vandamikil fyri brúkaran.

Í samband vi› at skipi› fær handa› hesa gó›kenning, ver›ur móttøka umbor› á "Vesturvón" i› liggur í Sørvági, mánadagin 25. sept., kl.: 16:00.

Beatles-vikuskifti í Føroyahúsinum

Fríggjakvøldi› 29. september og leygarkvøldi› 30. september ver›ur Beatles-dansur í Føroyahúsinum í Keypmannahavn, har føroyski bólkurin, The Beatles Live, fer at spæla

Undan dansinum ver›ur skipa› fyri Beatles-kvøldsetu vi› práti og tónleiki, har Húsakóri› fer at syngja sangir hjá The Beatles, og har Suni Merkistein, útvarpsma›ur, fer at huglei›a um kenda bólkin úr Liverpool.

Sí›sta vikuskifti› í september í Føroyahúsinum í Keypmannahavn er ogna› kendasta tónleikabólkinum nakrantí›, The Beatles, sum gavst at spæla fyri 30 árum sí›ani, men sum framvegis hugtekur allan heimin vi› sínum tónleiki.

Beatles-vikuskifti› í Føroyahúsinum, sum Kári Durhuus og Per Højgaard leggja til rættis, er ætla› bæ›i ungum og eldri, og bólkurin, The Beatles Live, fer at spæla í Føroyahúsinum hesi kvøldini. Eisini fer útvarpsma›urin, Suni Merkistein, at grei›a frá sínum arbei›i vi› 10 sendingum um The Beatles, sum vór›u sendar í Útvarpi Føroya fyrr í ár, og Húsakóri› undir lei›slu av Sunnleif Rasmussen fer at syngja sangir hjá The Beatles.

The Beatles Live

F‡ra royndir tónleikarar - tríggir føroyingar og ein dani - manna The Beatles Live, og vi› allari vir›ing fyri The Beatles royna teir at spæla beatles-tónleik á sama hátt, sum beatlarnir gjørdu ta›.

Tann einasti í bólkinum, sum er vaksin upp mitt í Beatles-tí›ini, er Magnus Jacobsen úr Fuglafir›i. Magnus er kendur frá føroysku poppbólkunum Silly Boys og Absurdy Fair. Í The Beatles Live hevur hann leiklutin hjá John Lennon. Hans Helleshøj Buch er danski limurin í The Beatles Live, og hann er í›in Beatles-fan. Í The Beatles Live er hann Paul McCartney.

Kartin Hansen úr Runavík er tri›i limurin í The Beatles Live, har hann er at hoyra í leiklutinum hjá George Harrison.

Jákup Olsen úr Fuglafir›i er fjór›i limurin. Jákup hevur spælt saman vi› Magnusi Jacobsen í bæ›i Silly Boys og Absurdy Fair. Jákup er Ringo Starr í The Beatles Live.

Bólkurin var› stovna›ur í 1999, og sí›ani tá hevur The Beatles Live spælt til fleiri tiltøk – t.d. føroyingaveitslur í Århus og Aalborg.

Beatles-kvøldseta

Í samband vi› Beatles-dansin ver›ur eisini skipa› fyri Beatles-kvøldsetu vi› tónleiki og samrø›um. Tónlistama›urin, Sunnleif Rasmussen, sum stjórnar Húskórinum, hevur vant nakrar sangir hjá The Beatles vi› kórinum, sum kóri› fer at syngja á kvøldsetunum í Føroyahúsinum. Á kvøldsetunum fer Suni Merkistein, útvarpsma›ur, eisini at grei›a frá arbei›i sínum vi› 10 sendingum um The Beatles, sum eru sendar í Útvarpi Føroya.

Útvarpsma›urin er ikki tónleikari, men hann hevur altí› veri› hugtikin av The Beatles, og tí fór hann í holt vi› sendingarnar. Høvi› var, at 30 ár eru li›in, sí›ani The Beatles gavst at spæla. Sendingarnar siga frá søguni um The Beatles frá byrjan til enda, og Suni Merkistein fer í frásøgn síni í Føroyahúsinum m. a. at grei›a frá sínum persónligu upplivingum vi› The Beatles og sendingunum. Tá sendingarnar vór›u gjørdar, var Suni í Liverpool og vitja›i eitt nú Penny Lane og The Cavern Club, har The Beatles vanliga spældi.

SOLAR FØROYAR

Starvsfólk søkist at byrja skjótast

Arbeiðsuppgávur:
Talan er um fjølbroytt arbeiði í umfatar sølu av alarmútgerð, edv, tele og alt tað ein elinnleggjari hevur brúk fyri.

Førleikakrøv:
Tann sum settur verður skal helst hava útbúgving sum elektrikari. Kunnleiki innan handil hevur eisini fyrimun.

Fyrispurningar og umsókn verður at senda til:

Solar Føroyar
Postboks 105
Brekkutún 2
110 Tórshavn
Tlf. 317933

Sosialurin - 311820

Okkara vitan er tín trygd
- tá íløgan skal gerast

Føroya Banki hevur nú møguleika at bjóða tær at taka lut í keyp og sølu á altjóða virðisbrævamarknaðunum.

Føroya Banki hevur tikið upp samstarv við íløgufelagið Bank-Invest, ið er millum elstu og størstu fyritøkur av sínum slag í Danmark.

Eitt íløgufelag, ið er eitt felag, har fleiri íløgufólk ganga saman, er ein góð loysn hjá fólki, ið hava eitt ávíst avlopsgjaldføri og ynskja virkna røkt av íløgunum, men hava ikki tíð og orku ella innlit í virðisbrævahandil.

Í Føroya Banka er tín íløga í hondum hjá fólki við sakkunnleika innan virðisbrævahandil. Tí er okkara vitan tín trygd, tá íløgan skal gerast.

Er hetta nakað fyri teg, er tú vælkomin at seta teg í samband við fíggjardeild bankans.

FØROYA BANKI

Húsagøta 3 • Postboks 3048 • FO-110 Tórshavn • Tel 31 13 50 • Fax 31 58 50
e-mail: fbk@post.olivant.fo • www.foroyabanki.fo